BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

12. februar 2025
Mál: 22/22133-118
Viðgjørt: -

Svar

upp á

skrivligan fyrispurning nr. 52-079/2024, eftir § 52a í Tingskipanini, frá Bárði á Lakjuni, løgtingsmanni, settur Djóna Nolsøe Joensen, landsstýrismanni í barna- og útbúgvingarmálum, um lesandi og fráflyting.

Spurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu nógvir føroyingar hava lisið í Danmark hvørt einstakt ár seinastu 10 árini sambært nýggju dátunum hjá Hagstovuni tilsamans og skift á bólkar av lesandi?
2. Kann landsstýrismaðurin lýsa gongdina fyri lesandi føroyingar á hægri útbúgvingum í Danmark hvørt einstakt ár síðstu 10 árini sambært nýggju dátunum hjá Hagstovuni?
3. Hvussu nógv hava lisið á hægri útbúgvingum í Føroyum hvørt einstakt ár síðstu 10 árini?
4. Hvussu samsvara tølini hjá Studna við svarini upp á fyrstu spurningarnar í hesum fyrispurningi?
5. Um tølini frá Hagstovuni og Studna ikki líkjast, hvør kann so orsøkin vera til tað?

Svar

Til 1: Hagstova Føroya hevur gjørt samstarv við Danmarks Statistik um at fáa meira vitan til vegar um persónar við føroyskum bústaðartilknýti, sum eru ella hava verið búsitandi í Danmark. Ein partur av hesum samstarvi fevnir um útbúgvingardátur úr skráum hjá Danmarks Statistik.

Sum úrslit av hesum samstarvi eru útgreinað hagtøl um førleikagevandi útbúgvingar á donskum útbúgvingarstovnum hjá persónum við føroyskum bústaðartilknýti, sum eru búsitandi uttanlands, tøk í hagtalsgrunninum.

Útgreinað hagtøl um persónar við føroyskum bústaðartilknýti, sum eru undir lestri á donskum útbúgvingarstovnum og búsitandi uttanlands, eru undir menning. Almenn hagtøl væntast at vera tøk í hagtalsgrunninum í ár. Ein seruppgerð við tal av lesandi á yrkisnámi og hægri útbúgving í Danmark, sum eru búsitandi uttanlands, vísa hesi tøl yvir lesandi í Danmark tíðarskeiðið 2012 - 2022:


2.356 (2012), 2.466 (2013), 2.421 (2014), 2.330 (2015), 2.163 (2016), 2.030 (2017), 1.874 (2018), 1.801 (2019), 1.737 (2020), 1.757 (2021) og 1.865 (2022).

Nærri útgreiningar av útbúgvingum og útbúgvingarstøði hjá teimum lesandi verða tøk í hagtalsgrunninum í ár. Ávíst fyrivarni skal takast fyri tølunum, av tí at talan er um hagtøl undir menning.

Til 2: Seruppgerðin vísir, at talið av lesandi á donskum útbúgvingarstovnum, sum eru búsitandi uttanlands, er minkað við umleið 500 persónum árini frá 2012 til 2022 – úr umleið 2.350 til umleið 1.850 lesandi árliga. Tað svarar til eina minking upp á góð 20 prosent.

Til 3: Eingi fullfíggjað almenn útbúgvingarhagtøl eru um lesandi ella førleikagevandi útbúgvingar í Føroyum.

Til 4: Studni hevur á heimasíðu síni eina uppgerð við tal av lesandi, búsitandi í Danmark, sum hava fingið lestrar- og ferðastuðul. Gongdin í talinum av lesandi í uppgerðini hjá Hagstovu Føroya og persónar, sum hava fingið lestrar- og ferðastuðul, búsitandi í Danmark, eru víst í myndini niðanfyri.



Grundarlagið undir uppgerðini hjá Studna eru tey, sum søkja um ferðastuðul. Fyri at fáa ferðastuðul er kravið, at viðkomandi er fulltíðarlesandi, hevur búð tvey av teimum trimum seinastu árunum í Føroyum undan lestrarbyrjan ella búð minst helvtina av lívinum í Føroyum. Stuðulin verður latin einaferð árliga, tó í mesta lagi normeraðu lestrartíðina + eitt ár. Stuðulin er 1.500 kr. Árliga, og barnastuðulin er millum 200 og 1.500 kr. fyri hvørt barnið eftir aldri. Umsóknarfreistir eru 30. juni og 31. desember. Tað er tann lesandi sjálvur, sum skal søkja um ferðastuðul.

Gongdin yvir ár sær út til at verða tann sama í uppgerðini hjá Hagstovu Føroya og Studna, men tølini hjá Studna vísa 1.000 færri lesandi.

Til 5: Orsøkirnar til at tølini eru ymisk, eru sum omanfyri nevnt, at talan er um tveir hættir at gera upp eftir. Skipanin hjá Studna telur bert tey, sum søkja um stuðul, meðan Hagstova Føroya samantvinnar skráir hjá Hagstovu Føroya og Danmarks Statistik og ger ein myndil. Hagstova Føroya fer at kunngerða almennu hagtølini seinni í ár, meðan Studni framhaldandi fer at greina sítt virksemi og leggja tað fram fyri almenninginum.

Eingi fullfíggjað almenn útbúgvingarhagtøl eru um lesandi ella førleikagevandi útbúgvingar í Føroyum. Til tað krevst, at Hagstova Føroya fær fígging at raðfesta menning og framleiðslu av útbúgvingarhagtølum sum hagtalsøki, ið er leysliga mett at kosta eina millión krónur árliga.

Vinarliga

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður